# Rúgvismikil pensjónsreformur

**Nýggi pensjónsreformurin, sum er lagdur fyri Tingið, telur heili 12 lógaruppskot og almennar viðmerkingar, sum telja heilar 344 síður. Men ikki øll eru nøgd við uppskotið**

Leo Poulsen

Leingi væntaði pensjónsreformurin er nú lagdur fyri Tingið.

»Í framtíðini verður talið av eldri fólki størri, meðan talið av arbeiðsførum spakuliga minkar. Hetta fer at seta føroysku pensjónsskipanina og vælferðartænasturnar undir stórt trýst. Við einum nógv størri tali av pensjónistum fara útreiðslurnar til pensjónir og til røkt av eldri fólki at vera nógv størri enn í dag«.

Soleiðis byrjar 344 síður langa frágreiðingin, sum er eitt úrslit av einari embætismannafrágreiðing frá 2009. Eisini hevur ein politiskur fylgibólkur verið inni og gjørt eina semju millum allar flokkar á Tingi.

Stóru flokkarnir hava havt tveir limir í bólkinum og teir báðir smærru hvør sín.

Fyri Fólkaflokkin hava sitið Óli Breckmann og Jákup Mikkelsen, fri Sambandsflokkin Helgi Abrahamen og Bjørn Kalsø, fyri Javnaðarflokkin Andrias Petersen og Hans Pauli Strøm, fyri Tjóðveldi Annita á Fríðriksmørk og Bergtóra Høgnadóttir Joensen, fyri Miðflokkin Karsten Hansen og fyri Sjálvstýrið Kári P. Højgaard.

Umframt tað hava eisini Aksel V. Johannesen, fíggjarmálaráðharri, Jóannes Eidesgaard, fyrrverandi fíggjarmálaráðharri og Rósa Samuelsen verið við í arbeiðinum.



*Tað er nýggi fíggjarmálaráðharrin, sum saman við Rósu Samuelsen leggur pensjónsnýskipanina fram*

## Nýggja skipanin

Í stuttum tekur arbeiðsbólkurin soleiðis saman um nýggja pensjónsreformin:

**Eftirlønarsamansparing:**

- Øll, sum eru knýtt til arbeiðsmarknaðin skulu gjalda 15 % til eina bundna eftirlønarsamansparing.
- Samansparingin er persónlig og skal verða útgoldin sum lívlang veiting og lutaeftirløn. Við pensjónsaldur verður møguligt at fáa eitt kapitalútgjald.

**Fólkapensjón:**

- Bundna eftirlønarsamansparingin ger tað møguligt at minka um útreiðslurnar til fólkapensjón.
- Í framtíðini verður mótroknað í allari fólkapensjónini. Mótrokningarfría upphæddin verður minni, og mótrokningar-prosentið verður lækkað.
- Útgjaldið úr Samhaldsfasta Eftirlønargrunninum verður hækkað, og verður sum í dag goldin øllum pensjónistum uttan mun til inntøku.
- Mótrokningin millum hjúnafelagar verður avtikin.

Politisk semja er gjørd, men ikki øll eru líka fegin um uppskotið.

leo@sosialurin.fo

# Pensjónistar ikki nøgdir

Leo Poulsen

Tað er serliga fólkapensjónsparturin, sum Landsfelag Pensjónista ikki er nøgt við, og tað lat Ingrid Henriksen, sum er ráðgevi hjá felagnum, gera greitt á Rás2 í gjár.



*Ingrid Henriksen*

Nógvar broytingar eru gjørdar í uppskotinum, síðani tað kom fram av fyrstan tíð.

– Og tað er vorðið nakað betri vil eg siga, men uppskotið er langt frá nóg gott sum er, og tað kemst serliga av, at grundupphæddin er burtur eftir 2018, sigur Ingrid Henriksen.

Hon sigur, at tað heldur felagið er sera óheppi, og tey ætla sær at gera vart við hetta.

– Vit vilja halda fast við, at grundupphæddin má ikki blíva burtur. Tey lágløntu gerast taparar í nýggju skipanini, tí ætlanin er at lækka mótrokningar upphæddina í fólkapensjónini, og tað er sera óheppið hjá fólki við lágum inntøkum. Og vit vita, at tað er ein so stórur partur av fólkapensjónistum, sum hava lágar inntøkur, sigur Ingrid Henriksen.

Ætlanin er at lækka hesa upphæddina frá 60.000 niður í 30.000 krónur komandi átta árini.

- Tað er soleiðis, at tá tað verður mótroknað í fólkapensjónini, so verða tað tey væl løntu, sum onga pensjón fáa, og tað er óheppi, tí tað hevur alla tíðina verið sagt, at fólkapensjónin er fyri øll, sigur Ingrid Henriksen.

Hon heldur, at verður tað gjørt á henda hátt, fara politikarar, sum framman undan hava eina høga eftirløn, fara ikki at hava áhuga fyri fólkapensjónini.

- Hetta fer at føra til, at politikarar ikki fara at hava áhuga í at hækka pensjónina so hvørt sum inflatiónin etur burtur av henni, og tí fer hon at minka í virði við tíðini, sigur Ingrid Henriksen.

Tað finst kortini okkurt gott í uppskotinum.

- Har finst í hvussu er ein góð broyting, og tað er hon, at mótrokningin millum hjúnafelagar verður avtikin, og tað er sera gott, sigur Ingrid Henriksen.

Hon roknar við, at nú tá uppskotið er lagt fyri Løgtingið, verður Landsfelag Pensjónista kalla inn fyri Trivnaðarnevndina, og har fara tey so at gera vart við sína ónøgd við uppskotið.

- So mugu vit bara vóna, at politikarar taka okkara viðmerkingar til eftirtektar, sigur Ingrid Henriksen.

